# Ofta etur hundur tað, hann havnar

ANNITA Á FRÍÐRIKSMØRK



150 mió út gjøgnum vindeygað. Ongin Marknagilsdepil og útlendsk arbeiðsmegi – talar tað til samvitskuna hjá Javnaðarflokkinum?

Og so var aftur samkoma uppi í Mentamálaráðnum í sambandi við miðnámsskúlan við Marknagil. Hesuferð var tað (aftur) ein byggiskrá fyri skúladepilin, sum varð handað landsstýriskvinnuni.

Vit sum hava fylgt málinum – við hvørt inni á miðlinjuni og nú úti á síðulinjuni - spyrja, hvussu nógv sjampanja skal drekkast og pinnamatur etast, áðrenn spakin verður settur í.

Og hvussu ofta skal skúlin koma sum lógaruppskot í løgtingið, áðrenn farið verður undir byggingina?

Í novembur 2003 vóru vit komin longur við Skúladeplinum við Marknagil, enn vit eru komin nú. Tá ið hetta árið er runnið, eru vit vónandi komin eins langt sum í 2003, altso 6 ár seinkað til onga nyttu, annað enn at vit nú eru komin í tíðarneyð og noyðast tí at skunda arbeiðið ígjøgnum við tí avleiðing, at neyðugt verður hesaferð at fara eftir útlendskari arbeiðsmegi at loysa uppgávuna.

Skúlin skal verða liðugur í 2014, sigur landssstýriskvinnan. Tað merkir, at tá ið projekteringin er liðug, so skulu vit brúka góðar 100 mió kr árliga til íløguna. Tað vóni eg, at konsensus er um í samgonguni, áðrenn slík lyfti verða givin til skúlaleiðslur, starvsfólk og næmingar. Og eg vóni, at samskiftið um hetta projektið, sum er tað størsta í føroyskari skúlasøgu, er betri enn samstarvið var um fíggjarlógina fyri 2009.

**Uttan fáfongd vóru skúlarnir lidnir**

Hevði Javnaðarflokkurin ikki forkomið miðnámsskúlanum við Marknagil, tá ið teir komu framat í 2004, so hevði skúlin verið liðugur! Og fyrstu pisurnar floygdar í summar. Og hølistrupulleikarnir í Hoydølum og á Tekniska skúla í Tórshavn høvdu verið loystir.

Og hevði Javnaðarflokkurin ikki forkomið miðnámsskúlanum í Vági høvdu næmingar gingið har 5. árið á rað. Og skúlin hevði ligið á einum nógv betri stað, enn hann ger í Hovi.

Men har skuldi ongin skúli byggjast! Hvørki í Vági ella við Marknagil!

Tað vóru greiðu boðini frá Javnaðarflokkinum, so skjótt tey komu til valdið í 2004. Boðini vóru til tann táverandi mentamálaráðharran Jógvan á Lakjuni, sum læt sær hesi boð lynda: hann flutti annan skúla til Hovs, og havnaði miðnámsskúlan við Marknagil. Og so hevði Javnaðarflokkurin fingið sín vilja.

**Arkitektar høvdu latið arbeiðið frá sær í 2003**

Í Vági var hakin settur í. Og við Marknagil var klárt at seta spakan í! Alt løgtingið hevði samtykt ætlanirnar báðar (eisini Javnaðarflokkurin!) Leiðslurnar á øllum trimum skúlunum, sum skuldu húsast við Marknagil, vóru samdar um at fara undir samstarvið! Arkitektar høvdu teknað skúlan sum eina byggilistarliga perlu, sum tók útgangstøði í landslagnum, útsýninum og ljósinum á staðnum, og tók støði í pedagogiskum grundarlagi, sum skuldi vera kveikjandi fyri umhvørvið og geva næmingum og lærarum íblástur.

**Nýggj bygginevnd kemur til somu niðurstøðu**

Nú er nýggj bygginevnd, sum hevur gjørt tað, sum hon varð biðin um. Men hon er komin til somu niðurstøðu, sum bygginevndin í 2003. Sambært portalinum 19. februar stendur, at bygginevndin er komin til ta niðurstøðu, at: "tað er greitt, at skúlin skal vera ein byggislistarlig perla, sum tekur útgangsstøði í landslagnum, útsýninum og ljósinum á staðnum, umframt at hann í síni tilevning skal vera kveikjandi og geva íblástur..." altso skulu vit byrja aftur har í 2009, sum vit byrjaðu í 2003.

**Tí stigtakarin var Tjóðveldi**

Umframt at alt forarbeiðið er gjørt, koma hesi projektini nú at kosta 150 mió kr meira, enn um projektini, sum vóru klár í 2003, vóru fylgd. Men alt skuldi skrottast, tí stigtakarin var Tjóðveldi. Alt skal gerast av nýggjum. Nýggj byggiskrá, sum kemur til somu niðurstøðu viðvíkjandi tørvs- og funktiónslýsing,.

Nú verður sagt, at onki ítøkiligt er komið á pappír, um hvussu skúlin skal síggja út. Nei, sjálvandi er onki liðugt, um Javnaðarflokkurin aftur og aftur havnar tí, sum verður gjørt.

**Tá ið kontinuitetur er betri enn tað besta**

Ímyndið tykkum, um vit vóru eins fáfongd. So høvdu vit eisini undir CHE samgonguni havnað Miðnámsskúlanum í Hovi, tí Javnaðarflokkurin tók tað stigið. Men tað gjørdu vit ikki, vit lótu byggingina í Hovi halda fram, har ABC slepti. Hví? Tí viðhvørt noyðist tú at byggja á herðarnar á teimum, sum undan fara. Óansæð hvat tú heldur um avrikið hjá undanfólkunum. Kontinuitetur ella framhald er viðhvørt betri enn tað besta. Soleiðis var í Hovi. Vit halda og hildu, at skúlin hevði ligið best í Vági. Men tá ið Javnaðarflokkurin megnaði at havna tí ætlanini, meðan vit sótu í andstøðu, so valdu vit at liva við tí, tá ið vit aftur komu í samgongu, tí har vendist ikki aftur.

**150 mió kr út gjøgnum vindeygað áttu at tala til samvitskuna**

Í 2003 var væntandi, at skúlin kom at kosta knappar 300 mió kr. Nú sigur verklagslógin, at fíggjarkarmurin liggur um knappar 400 mió kr. Altso 100 milliónir krónur dýrari!

Og skúlin í Hovi kemur at kosta einar 50 mió kr meira, enn hann hevði gjørt, um hildið varð fram í Vági, har byrjað var.

Bara hasi bæði projektini hava sostatt higartil kostað skattgjaldaranum 150 mió kr meira enn fysiska virðið í íløguni. Um hasar hálvtannaðhundrað milliónirnar ikki tala til samvitskuna hjá Javnaðarflokkinum, sum nú vegna sparingar er við til at leggja stovnar niður, steingja deildir og senda fólk til hús, so sigi eg onki.

# Kommunubygnaður í Suðuroynni

KIRSTIN STRØM BECH
Borgarstjóri, Vágur



Við feitari yvirskift stóð at lesa í Sosialinum tann 19. februar: " Vágbingar vilja ikki ganga í takt".

At onkur viðmerking til málið um kommunusamanlegging í Suðuroy kom frá blaðmanninum, sum møtti á býráðsfundinum tann 18. feb, var væntandi, men at tíðindini vóru so neilig, er sera harmuligt.

Í tveimum undanfarnum valskeiðum hevur Vágs býráð samtykt, at skal Suðuroyggin leggja saman, so skal tað gerast í tvær kommunur.

At tað á síðsta býráðsfundi varð samtykt, at Vágs býráð vil vera við at seta ein arbeiðsbólk at kanna fyrimunir og vansar við einari ella tveimum kommunum í Suðuroynni, meti eg sum eitt stórt framstig.

Í politikki er rættiliga ofta soleiðis, at mál skulu hava tíð til at búnast. Soleiðis síggi eg eisini hetta mál. Frá bert at ganga við til tvær kommunur í Suðuroynni, vil Vágs býráð nú vera við til at fáa greina og lýst fyrimunir og vansar við einari - og somuleiðis tveimum kommunum.

Hetta er ikki meira enn rímuligt.

Í 2006 var fólkaatkvøðugreiðsla í Vági um kommunusamanleggingar. Meirilutin av veljarunum vóru fyri, at Suðuroyggin skal leggja saman í tvær kommunur. Fyri at gera sær vón um, at veljarin kann taka eina sakliga støðu, má upplýsing og útgreining til. Og tað er tað býráðið vil, soleiðis at grundarlagið fyri støðutakanini er so gott sum gjørligt.

Sjálv havi eg sagt frá, at eg eri fyri at leggja kommunurnar í oynni saman í eina kommunu, og at eg meti tað neyðugt, at ein sáttmáli er væl útgreinaður, áðrenn stigið verður tikið. Havi ongan trupulleika av, at fyrimunir og vansar við tveimum kommunum somuleiðis verða kannaðir. Hetta vil bert geva borgarunum eitt enn betri grundarlag fyri at taka støðu.

Á sama býráðsfundi vóru 13 onnur mál á skránni. Okkurt av hesum hevði verið áhugavert hjá lesarunum at frætt um. T.d leigumál við Arbeiðsmannafelagið Framtíðina um hølir til Musikkskúlan -og harafturat játtan til útgerð til sama - og tilsøgn um at vera við í projektering av eftirskúla í Hvalba. Hesi mál høvdu ongan áhuga hjá blaðmanninum.

Við tílíkum tíðindaflutningi má ásannast, at fjølmiðlarnir ikki leggja nakað jaligt íkast til samanleggingartilgongdina, men heldur dyrka ósemjurnar, dyrka frástøðuna millum partarnar.

# ABC "in" = Almannaøkið "yt"?

BERGTÓRA HØGNADÓTTIR JOENSEN



At seta arbeiðsbólkar, kommisjónir, skjóttarbeiðandi nevndir – you name it – hava vit sæð í mongum førum. Vit hava sæð slíkar nevndir í sambandi við: kommunumál, umhvørvi, ES, heilsuøki, fiskivinnu. Hví verður hesin leistur ikki nýttur á almannaøkinum í nógv størri mun?

**Almannaøkið so dýrt**

Ofta hoyrist, at økið er so dýrt. Júst tí er sera umráðandi, at peningurin verður nýttur við størsta skynsemi, ella hvussu?

Harafturat er veruleikin, at vit øll kunnu fáa tørv á hjálp frá almannaøkinum fyrr ella seinni. Ja, ikki minst seinni – eldraøkið er jú eisini almannaøkið.

**Ov lítið prestige?**

Sosiala økið er ikki tað sum fær mest rúmd ella tykist at vera mest umbiðið sum annað enn valagn. Løgið, tá ein hugsar um, at tað er ein stórur útreiðslupostur. Mín varhugi eftir eitt ár í tinginum er, at tað eru ov fá í politikki sum halda økið vera áhugavert og seta seg inn í tað av álvara.

**Her og nú sparingar**

Tá sparingarnar á almannaøkinum eru komnar niðan í tingið, eru fleiri dømi um, at tey eru skundað ígjøgnum á ein hátt, so trivnaðarnevndarformaðurin ikki so mikið sum hevur loyvt hoyringum - úrslitið hevur verið hareftir.

**Sært tú logikkin?**

Tá Smyril Line skuldi hava enn eina stóra milliónaupphædd og sigarettkeglið hjá samgonguni var í hæddini, varð ikki eitt orð sagt um stóra hallið á fíggjarlógini – men nú tað snýr seg um tey veikastu í samfelagnum, tosar samgongan um hallið og sigur, at øll mugu skilja, at vit skulu spara.

Tað hevur mangan víst seg at vera heppið fyri politikarar, at fjøldin gloymir so skjótt – vóni ikki hetta er ABC-mottoið!

**Hvat hevði Gallup sagt?**

Um vit gjørdu eina Gallupkanning fyri at lýsa, hvørjar raðfestingar vanligi føroyingurin helt vera skilabest, hevði úrslitið tá verið tað sama sum ABC-praksis? Nei, tað vænti eg heldur ikki!

**Signalvirðið í sparingunum**

Tað gleðir meg at síggja landsstýriskvinnuna tvíhalda um, at arbeiðið á Familjudeildini á Føroya Barnaheimi kortini ikki skal niðurleggjast, og at hon væntandi fær eina eykajáttan. Haldi at Rósa Samuelsen hevur nógvar góðar ætlanir.

Sjálvandi skal eykajáttanin vera útreiðsluneutral. Men eftirsum tað einamest eru almannaøkið og málsøkini hjá Helenu Dam á Neystabø, sum hava spart til í ár, átti tað at verið lagamanni hjá hinum landsstýrisfólkunum, nú at vísa ábyrgd og prógva at teir eisini kunnu spara. Eg fegnist, um tað eru íløgur til tunnlar sum verða skerdar.

**Íblástur til ABC**

Annars er hópurin av íblástri til inntøkur hjá landinum í minnilutaálitinum hjá Annitu á Fríðriksmørk og Tórbirni Jacobsen í samband við fíggjarlógina. Har eru umhvørvisgjøld, hægri skatt til tey við hægstu inntøkunum, hækka gjald í samband við arv, taka rentustudningin burtur – í smáum væl at merkja. - Hesar venda allar sosialt rætt – fáið tykkum endiliga íblástur higani, ABC!